# SKRÁ FYRI FJARÐASTEVNU 2004 Í VESTMANNA



**Hósdagur 1. juli**

| | |
|---|---|
| 14.00 | Minihondbóltur |
| 15.00 | Hondbóltur dreingir 10 VÍF - EB |
| 15.30 | Hondbóltur gentur 12 VÍF - StÍF |
| 16.10 | Hondbóltur dreingir 12 A VÍF - Kyndil |
| 16.50 | Hondbóltur dreingir 12 B VÍF - Kyndil |
| 17.30 | Hondbóltur gentur 14 A VÍF - Kyndil |
| 18.20 | Hondbóltur gentur 14 B VÍF - Søljan |
| 19.10 | Hondbóltur dreingir 14 VÍF - StÍF |
| 20.10 | Hondbóltur gentur 16 VÍF - StÍF |
| 21.10 | Hondbóltur dreingir 16 VÍF - KÍF |
| 18.00 - 24.00 | Sigling við vatnskutarum, atgongumerki verða seld á sandinum |

**Fríggjadagur 2. juli**

| | |
|---|---|
| 18.00 | Tivoli á keiøkinum og inni á Atlantis |
| 18.00 - 24.00 | Sigling við vatnskutarum, atgongumerki verða seld á sandinum |
| 19.00 | Evangeliskt møti í Saron |
| 19.00 | Undirhald fyri børn í ítróttarhøllini. Búktalari, gyklarar, barnasangur, skemt o.a. Kostnaður 50 kr. |
| 20.00 | Missiónshúsið hevur útmøtið á Torginum - aftaná verður opið hús í Missiónshúsinum |
| 22.00 - 24.00 | Livandi tónleikur á Bryggjuni |
| 22.00 | Saron hevur útimøti á Torginum, opið hús við kaffi og sangi verður í Saron aftaná |
| 23.00 - 04.00 | Dansur í Ítróttarhøllini við bólkinum "Rok" |

**Leygardagur 3. juli**

| | |
|---|---|
| 10.00 - 14.00 | Sigling við vatnskutarum, atgongumerki verða seld á sandinum |
| 11.30 | MBM-rennikapping. Bragdið skipar fyri rennikapping á keiøkinum. Tilmelding á heimasíðuni hjá Frælsum Ítrótti Føroya www.atheletics.fo í seinasta lagi kl. 20.00 kvøldið fyri. Luttøkugjaldið kr. 50 fyri vaksin og kr. 20 fyri børn verður goldið, tá startnummarið verður avheintað |
| 11.30 | Avheintan av startnumrum við Føroya Sparikassa |
| 12.00 | Vaksin (f. 59-86) og Veteranar (f. -58) renna 5 km |
| 12.35 | Gentur og dreingir -7 (f. 97-) renna 500m |
| 12.45 | Gentur og dreingir -10 (f. 94-96) renna 1 km |
| 12.55 | Gentur og dreingir -13 (f.91-93) og gentur og dreingir -17 (f.87-90) renna 2 km |
| 13.05 | Heiðursmerkjahandan |
| 13.45 | Ítróttarfólk ganga skrúðgongu úr skúlanum oman á Torgið. Øll ítróttarfólk hjá VÍF verða biðin at møta við høllina kl. 13.30 |
| 14.00 | Stevnan verður sett á Torginum av Bárði Nielsen, landstýrismanni. Vestmanna sangkór syngur |
| 14.00 | Matsøla í missiónshúsinum |
| 14.00 - 18.00 | G-festivalurin selur atgongumerki í forsølu á keiøkinum |
| 14.30 - 23.00 | Tivoli á keiøkinum og inni á Atlantis |
| 15.00 | FM - Kappróður |
| 17.00 | (eftir róðurin) Steypahandan á Torginum, Palli Joensen handar steypini |
| 18.00 - 22.00 | Aulin: "List og handverk" - framsýning av list við m.ø. málningum, handverki og søguligum lutum úr Vestmanna |
| 18.00 - 24.00 | Sigling við vatnskutarum, atgongumerki verða seld á sandinum |
| 19.00 | Evangeliskt møti í Saron |
| 20.00 | Missiónshúsið hevur útimøti á torginum - aftaná verður opið hús í missiónshúsinum |
| 22.00 - 24.00 | Livandi tónleikur á Bryggjuni |
| 22.00 | Saron hevur útimøti á Torginum, opið hús við kaffi og sangi verður í Saron aftaná |
| 23.00 | Felagssangur á Torginum, Finnbogi Joensen skipar fyri Midnáttarrøða á Torginum við Øssur D. Jacobsen |
| 24.00 | Dansur í Ítróttarhøllini, "Jóan Magnus Danielsen band" spæla |

**Sunnudagur 4. juli**

| | |
|---|---|
| 11.00 | Guðstænasta í Vestmanna kirkju v/ Marjun Bæk, presti |
| 11.00 | Morgunmøti í Saron |
| 11.00 | Morgunmøti í Gideon |
| 14.00 - 22.00 | Aulin: "List og handverk" - framsýning av list við m.ø. málningum, handverki og søguligum lutum úr Vestmanna |
| 14.00 | Undirhald á kaiøkinum við m.ø. kappkoyring fyri børn í kassabilum togtogan millum flakakvinnur: dagvaktin móti kvøldvaktini tryllubørukoyring og posarenning millum starvsfólk á Vest Pack og í peningastovnunum |
| 14.00 - 24.00 | Sigling við vatnskutarum, atgongumerki verða seld á sandinum |
| 15.00 - 23.00 | Tivoli á keiøkinum og inni á Atlantis |
| 15.00 | Fólkafundur í viðalundini. Evni: UMHVØRVIÐ |
| 16.00 | Konsert í ítróttarhøllini við Magna Christiansen, Martin Joensen v.fl. |
| 16.00 - 18.00 | Ponyríðing á fótbóltsvøllinum inni á Fjørð |
| 18.00 - 20.00 | Framsýning av motorsúklum á kaiøkinum |
| 20.00 | Missiónshúsið hevur útimøti á torginum - aftaná verður opið hús í missiónshúsinum |
| 20.00 | Hondbóltur 1.deild menn VÍF - Kyndil |
| 22.00 - 03.00 | Dansur á Bryggjuni, "GO GO - blues" spæla |

## VÆLKOMIN Á FJARÐASTEVNU Í VESTMANNA

**Í samband við Fjarðastevnuna koyrir náttbussurin hesar tíðir:**
**Fríggjadagin 2. og leygardagin 3. juli:**

kl. 23.30 Vestmanna - Tórshavn
kl. 00.30 Tórshavn - Vestmanna
kl. 03.30 Vestmanna - Tórshavn
kl. 04.30 Tórshavn - Vestmanna

**Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð bæði kvøldini**
**Tlf. 424254 og 217752**



# Fólk trívast í Vestmanna

**Bygdarráðsformaðurin í Vestmanna, Gunn Joensen, takkar í heyst fyri seg, eftir at hon hevur sitið heili 12 ár í bygdarráðnum. Hon heldur, at Vestmanna er ein bygd, har fólk trívast**

SAMRØÐA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Gunn Joensen, sum hevur sitið í bygdarráðnum í Vestmanna í 12 ár, harav tey átta sum bygdarráðsformaður, fer í heyst at takka fyri seg og lata onnur sleppa framat.*
*Mynd: Terji Nielsen*

Gunn Joensen hevur í átta ár sitið við róðrið í Vestmanna bygdarráð, men tá ið val verður aftur í heyst, takkar hon fyri seg og letur onnur sleppa framat. Hon hevur sitið 12 ár í bygdarráðnum, og sum áðurnevnt hevur hon seinastu átta árini sitið sum bygdarráðsformaður. Hon heldur ikki, at tað hevur merkt lívið í bygdini, at fast samband er komið um Vestmannasund.

### Nýggjur dagstovnur

Seinni í ár letur ein nýggjur dagstovnur upp í Vestmanna. Í løtuni er bert útibarnagarður og so dagrøktarskipanin, men Gunn Joensen sigur, at dagrøktarskipanin verður niðurløgd í næstum, tí tað gongur so striltið við at fáa dagrøktarmammur. Sjálv heldur Gunn Joensen eisini, at fólki dámar best, at børnini verða ansaði á stovni, tí tá eru tey í enn størri mun saman við øðrum børnum.

Tá ið avgjørt var at fara undir at gera undirsjóartunnil undir Vestmannasund, vóru tey mong, ið væntaðu, at hetta fór at verða mønustingurin hjá Vestmanna, men nú hálvtannað ár eftir, at tunnilin lat upp, kann staðfestast, at eingin broyting er í fólkatalinum í bygdini. Bygdarráðsformaðurin greiðir frá, at seinastu mongu árini hevur fólkatalið í Vestmanna ligið rættuliga støðugt um tey 1200, og hon heldur ikki, at nøkur tekin eru um, at fólk ætla sær at flyta úr bygdini.

### Lítil áhugi fyri nýggjari útstykking

Í fjør var farið undir eina nýggja útstykking uppi í Miðalsbrekku, beint vestan fyri Hórará, men áhugin fyri nýggju grundstykkunum er ikki serliga stórur, sigur Gunn Joensen. Orsøkin til hetta er eftir hennara tykki, at so nógv eldri hús í Vestmanna hava verið til sølu seinastu tíðina, og fleiri ungar barnafamiljur hava keypt hesi hús, greiðir bygdarráðsformaðurin frá og leggur afturat, at í flestu førum er talan um hús, sum eldri fólk, ið eru deyð, hava búð í. Í nýggju útstykkingini eru 25 grundstykkir, og prísurin liggur um 200.000 krónur, tá ið stykkið er planerað.

### Nógv sjófólk

Fá veruliga stór arbeiðspláss eru í Vestmanna. Størsta arbeiðsplássið er óivað Fiskavirking, men harafturat eru eitt nú Vest Pack og Timburhandilin. Fyrr í ár lat laksavirkið Atlantis aftur, og tað kostaði sjálvsagt nøkur arbeiðspláss, men tó tykist tað ikki, sum um nakað veruligt arbeiðsloysi er í bygdini, tí at tá ið Fiskavirking í Vestmanna herfyri hevði tørv á 15 fólkum, eydnaðist tað teimum einans at fáa fatur á tveimum.

Gunn Joensen sigur, at rættuliga nógvir vestmenningar eru sjómenn, og nógv skip, so sum Grønanes, Vestmenningur og Vesturbúgvin eru heimahoyrandi í bygdini, og tískil er sjógvurin óivað størsta arbeiðsplássið hjá bygdarfólkinum.

### Bygdarráðið fær vitjan á Fjarðastevnu

Tað er ítróttarfelagið í bygdini, VÍF, sum fyrst og fremst stendur fyri Fjarðastevnuni. Gunn Joensen sigur, at uppgávan hjá kommununi er fyrst og fremst at skapa karmarnar fyri stevnuni á ymsan hátt. Sjálva fjarðastevnuna verður Gunn Joensen annars nógv upptikin av, at Vestmanna kommuna fær vitjan úr Íslandi. Tað er bygdarráðið í vinarkommununi hjá Vestmanna í Íslandi, Snæfellsbæ, sum kemur á vitjan, og í tí sambandi eru bygdarráðslimirnir í Vestmanna nógv upptiknir á stevnuni.

### Spennandi ætlanir

Viðvíkjandi ætlanunum um bygging av matstovu og kunningarstovu inni á Fjørð, sigur Gunn Joensen, at eftir hennara tykki eru hesar ætlanir rættuliga spennandi og áhugaverdar. – Tað er gott fyri bygdini við slíkum ætlanum, tí tað fer uttan iva at skapa meiri lív í bygdini, sigur hon. Fyribils er Vestmanna kommuna ikki ein fíggjarligur partur av hesum ætlanum, men aðrastaðnis er vanligt, at kommunur eru við til at reka kunningarstovur, og tí er ikki óhugsandi, at Vestmanna kommuna fer at koma upp í ætlanirnar.

Nú Gunn Joensen fyrireikar seg til seinastu bygdarstevnuna sum bygdarráðsformaður, gleðir hon seg til at síggja nógv fólk koma á vitjan í Vestmanna, og vegna kommununa bjóðar hon øllum at verða hjartaliga vælkomnum.

# Gamlar myndir úr Vestmanna



*Barnaflokkur avmyndaður á Bakkanum umleið 1963.*
*mynd: www.vestmanna.fo*



*Kendi vestmannabólkurin Westerns. Guttorm Christiansen, Marner Gaard, Heðin Follend, Jón Miðberg og Niels Olsen. Avmyndaðir í Dansistovuni, helst miðskeiðis í 60´unum.*
*Mynd: www.vestmanna.fo*